## Atli ikki við sunnudagin

Atli Danielsen fór út við skaða í dystinum í gjár, og verður neyvan klárur hjá KÍ sunnudagin. – Tað havi eg ikki góðar vónir um, viðgekk Atli Danielsen eftir dystin í gjár. Hann fekk eitt slag á fótliðin, sum var ógvuliga hovin eftir dystin, har Atli Danielsen gekk við ísi um fótin. – Tað er ræðuliga keðiligt at verða skiftur út ein dyst sum henda, men tá tú ert skaddur er tað sjálvandi betri fyri liðið, at ein frískur maður kemur inn, segði Atli Danielsen.



## Bara ein havnarmaður á liðnum

Av teimum 11, sum byrjaðu inni á føroyska liðnum í gjár, var bara ein havnarmaður. Jónas Þór Næs er einasti leikarin, sum er uppvaksin í einum havnarfelag – í hansara føri B36. Fimm minuttir fyri leiklok varð Jákup á Borg skiftur inn, og hesa løtuna til dysturin varð bríksladur av, vóru tveir havnarmenn á føroyska liðnum – báðir uppvaksnir úr B36. Umframt havnarmannin byrjaðu seks eysturoyingar inni, tveir klaksvíkingar, ein suðuroyingur og ein dani.

# Frálíkt føroyskt avrik



**Sum lið kunnu leikararnir einans vera ernir av sínum avriki í gjár, men eisini mann fyri mann kann hvør einasti leikari ganga við røttum ryggi. Allir stríddust fyri liðið og allir stríddust fyri hvørjum øðrum. Tí var talan um eitt frálíkt føroyskt avrik**

LEIKARAMETING
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

### 1. Jákup Mikkelsen, 63/-142

Vísti veruliga hví Brian Kerr valdi at taka hann framum Gunnar Nielsen, og hann vísti eisini, at hetta var ein røtt avgerð. Royndi málverjin var tryggur í næstan øllum, hann gjørdi. Hóast hann onkutíð áður hevur havt meiri at gjørt, man bjargingin í 71. minutti, tá hann við beininum vardi fyri einum skoti eftir eitt frálíkt franskt álop, teljast millum hansara bestu. Somuleiðis komu hansara longu útspørk ógvuliga væl við í gjár.

### 2. Jónas Þór Næs, 8/0

Spældi sín besta landsdyst nakrantíð. Við monnum sum Evra, Malouda og Ribery sum beinleiðis mótstøðuleikarar, tók Jónas broddin av teimum. Einaferð stóð hann skeivt plaseraður, tá hann gjørdist akkurát ov stuttur til ein bólt, ið varð spældur upp um hann, og Anelka fangaði aftanfyri hann, men við sínum ótroyttiliga vilja og ótrúligu arbeiðsorku taldist Jónas millum bestu leikararnar á vøllinum.

### 3. Jóhann Troest Davidsen, 12/0

Hevði stóran lut í føroyska uppspælinum, tá Jóhann ofta var maðurin, ið fekk bóltin frá Jákupi Mikkelsen. Hetta prógvar, at maðurin torir og vil spæla fótbólt – eisini í móti fronskum heimsstjørnum. Sum oftast slapp Jóhann sær væl av við bóltin, eins og hann í verjupartinum ikki spardi seg. Var einaferð runnin av dekan ov lætt í samband við eina hornasparksstøðu miðskeiðis í fyrra hálvleiki, men spældi sum heild ein fínan dyst. Eisini deiligt at síggja ein so ungan mann sum hann biðja fronsku heimsstjørnurnar taka seg saman, tá hesar ýlandi og ómotiverað tveita seg niður, eftir at hava tapt ein nærdyst. »Fuck off!« vóru boðini til teirra.

### 4. Atli Gregersen, 2/0

Óroyndi Víkingurin spældi í gjár, sum um hann ikki hevði gjørt annað enn at spæla í móti heimsstjørnum. Var sterkur í luftspælinum og stýrdi verjuni væl. Tók sær væl og virðiliga av Anelka, sum næstan ikki sást aftur í skugganum av Atla Gregersen. Gøtumaðurin tók hvønn nærdyst, hann kundi, spardi seg ongantíð og var deiliga ósmæðin á vøllinum. »Put the fucking ball out!«, rópti Atli einaferð eftir franskmonnum, tá ein av okkara lá skaddur, og sum heild hoyrist hann væl á vøllinum – og tað er gott. Fekk eitt gult kort í fyrra hálvleiki, sum kortini ikki nervaði hansara spæl á nakran hátt seinni.

### 5. Egil á Bø, 8/0

Prógvaði enn einaferð, at tað var rætt av Jógvan Martin Olsen at innlima seg í landsliðshópin, og rætt av Brian Kerr at halda áfram við sær í miðverjuni. Egil var tryggleikin sjálvur og spældi sín besta dyst í ár yvirhøvur. Fór út við skaða tíðliga í seinna hálvleiki, men kom inn aftur og beint í eldin, tá hann við tveimum góðum blokadum vardi fyri fronskum atsøknum á føroyska málið. Var sterkur í luftspælinum, og var eisini snýttur fyri eitt brotsspark miðskeiðis í fyrra hálvleiki, tá hann tveitti seg fram í eitt innlegg, men varð kroystur um koll á vegnum.

### 6. Atli Danielsen, 32/0

Spældi bara ein lítlan hálvleik, men royndist væl hesa løtuna inn til hann fekk eitt slag á økilin og fótøliðin, og noyddist lata seg skifta út. Teir 42 minuttirnar Atli Danielsen var á vøllinum royndist hann tó væl, flutti seg gott slapp sær væl av við bóltin.

### 7. Fróði Benjaminsen, 53/3

Helst besti leikarin á føroyska liðnum í gjár. Var ótrúliga sterkur á miðvøllinum – bæði í smáspælinum og í luftspælinum, har hann hevði tikið yvir leiklutin hjá Røgva Jacobsen og skuldi vinna høgu bóltarnar. Vann nógv fríspørk, sum so vunnu føroyska liðnum tíð og orku, og kundi altíð spælast, eisini tá hann hevði ein mann í rygginum. Varð fluttur í miðverjuna eina løtu, tá Egil var úti við skaða, og eisini har spældi hann við yvirliti og sannføring. Flott Fróði!

### 8. Símun Samuelsen, 24/1

Spældi ein frálíkan dyst í vinstra borði. Arbeiddi væl bæði aftur og fram eftir vøllinum. Tordi at bjóða av og inn í millum riggaði tað eisini. Var eisini ágangandi í sínum pressspæli, og átti í roynd og veru einasta føroyska skoti úti frá, tá hann smekkaði til úr 25 metrum, tá ein tími var spældur.

### 9. Súni Olsen, 35/2

Var ikki eins eyðsýndur, eins og vit